Álit

í

løgtingsmáli nr. 16/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í lovbekendtgørelse om Straffeloven (Revsilógin) (Innleiðandi ásetingar, vanligar treytir fyri at nýta revsirættarligu ásetingarnar, treytir fyri revsingarbæri, brotsroynd og viðvirkan, revsiábyrgd fyri løgfrøðiligar persónar, revsingarnar, treytað fongsulsrevsing, samfelagstænasta, aðrar rættarfylgjur av teirri revsiverdu gerðini, at áseta revsing og uppathald av rættarfylgjum av teirri revsiverdu gerðini)

Landsstýrismaðurin í lógarmálum, Bjarni K. Petersen, hevur lagt málið fram tann 21. september 2023, og eftir 1. viðgerð tann 19. oktober 2023 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 24. oktober og 14. november 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í lógarmálum, Bjarna K. Petersen.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Løgtingið samtykti í 2015 einmælt at heita á landsstýrið um at fara undir at dagføra, endurskoða og týða revsilógina umframt at laga lógina til føroysk viðurskifti, sí løgtingsmál 17/2015. Arbeiðið hevur verið gjørt í stigum, og við hesum uppskotinum er seinasti parturin av revsilógini týddur til føroyskt.

Tað er av stórum týdningi fyri rættartrygdina hjá fólki, at ein so grundleggjandi og týdningarmikil lóg sum revsilógin er á føroyskum máli.

Við hesum uppskotinum er almenni parturin í revsilógini, kapitlarnir 1 til 11, føroyskaður. Í almenna partinum eru vanligu treytirnar fyri at kunna revsast ásettar, og hetta er galdandi fyri øll revsiverd viðurskifti. Eisini tey, ið eru ásett í serlóggávu. Stórvegis innihaldsligar tillagingar verða ikki gjørdar við hesum uppskotinum, men tó eru ávísar broytingar umframt neyvlýsingar av galdandi rættarvenju.

Ásetingarnar um samfelagstænastu verða dagførdar, og ætlanin er í størri mun at nýta samfelagstænastu heldur enn treytaleysa fongsulsrevsing, tá hetta er møguligt. Hetta kann eitt nú vera, tá persónur fremur lógarbrot fyri fyrstu ferð. Lagt verður eisini upp til, at viðgerðartilboð ella útbúgvingartilboð skula kunna vera ein triðingur av samfelagstænastuni. Rættarnevndin leggur áherðslu á, at tað hevur týdning, at landsstýrið tryggjar sær, at nøktandi viðgerðartilboð og útbúgvingartilboð eru tøk í hesum sambandi.

Tað verður nevnt í uppskotinum, at ætlanin er at fara undir at gera eina nýggja føroyska revsilóg, sum í størri mun tekur støði í føroyska samfelagnum. Eyðsæð er hetta eitt stórt arbeiði, ið tekur drúgva tíð og eitt arbeiði, ið eins og týðingin av revsilógini fer at fevna um meira enn eitt samgonguskeið.

Við hesum viðmerkingunum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 16. november 2023

Hervør Pálsdóttir forkvinna	Helgi Abrahamsen næstformaður	Kristianna W. Poulsen
Henrik Old	Kim Durhuus	Steffan Klein Poulsen

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur